Götu Kommuna

# Kunngerð

## um framløgu av broytingarupp-skotum í býarskipan og byggisam-tykt fyri Gøtu kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á fundi tann 29. januar 2007 samtykt at fremja broytingar í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Gøtu kommunu.

**Broytingarnar eru:**
at matr. nr. 179 b , Syðrugøtu, har virkisbygningurin hjá p/f Tøting stendur, verður broytt frá økið C, til vinnuendamál til økið B1, til alternativa íbúðarbygging .

Somuleiðis verður partur av matr. nr. 239, Syðrugøtu (Hagaparturin: Fyri oman Heiðar, leigari: Tummas Thomsen) og 241, Syðrugøtu (Hagaparturin : Fyri oman Heiðar, leigari : Andrass Vinther, broytt frá H, Frílendi til B1 økið og eitt øki við Juksnará partur av matr. nr. 104c, Syðrugøtu (Gøtu kommunu) verður broytt frá H, frílendi til F, almenn frítíðarøki.

Broytingarnar verða lýstar á tekning dagf. 25.01.2007.

Broytingaruppskotini, ið eru lýst við litaðum kortum, hanga uppi í gongini á kommunuskrivstovuni til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðunum frá 5. mars til og við 7. juni 2007. Somuleiðis verða broytingaruppskotini nú løgd út á heimasíðu kommununnar: www.gota.fo, vel: borgarin, byggisamtyktir.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi tann 30. juni 2007.

***Gøtu kommuna, 28. 02 2007***

STARVSMANNAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður **hósdagin 22. mars 2007, kl. 19.00 í hølum felagsins J.H. Schrøtersgøta 9.**

Skrá:

1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársrokniskapi til góðkenningar.
3. Viðtøkubroytingar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **hósdagin 15. mars 2007.**

*Nevndin*

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Skúlaheimsleiðari

Starvið, sum skúlaheimsleiðari, er leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur:**

- Skipa dagliga arbeiðið á Skúlaheiminum
- Umsiting av skúlaheimsrakstri, herundir eisini umsiting av útleiguvirksemi.
- Fyriskipa tiltøk fyri næmingunum á heiminum
- Hevur reingerðingina av øllum skúlanum sum málsøkið

**Vit ynskja at umsøkjarin hevur:**

- Góð evni at samskifta við ungdómi
- Vera fyrikomandi og hava góð evni at samstarva við starvsfólki og viðskiftafólki hjá Skúlaheiminum
- Námsfrøðiliga útbúgving/- ella líknandi royndir
- Leiðsluroyndir

Starvið verður lønt sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og FTL.

Umsóknir, saman við prógvum og CV, skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi, **mánadagin, 19. mars 2007.**

Víst verður til heimasíðu skúlans www.tst.fo

Nærri um starvið fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran, tel. 308050

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**

lysing-skhleidari 2

## Tórshavnar Bátafelag

Ársveitslan verður leygarkvøldið 10. mars kl. 19.30 í Róðrarneystinum á Argjum.

Atgongumerki kunnu keypast á Kunningarstovuni.

***Nevndin***

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins største úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820